# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Árni Johansen**, ættaður úr Vestmanna, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 28. apríl 74 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 2. mai klokkan 14.

**Karl Høgnesen** andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi leygardagin 28. apríl, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Dagurin**

**1. mai. Valborgarmessa.** Hildin til minnis um enska kongsdóttur og nunnu, sum seinni gjørdist abbadissa í kleystrinum Hildesheim í Týsklandi. Hon doyði í 779. Valborgarnátt varð hildin mikil várveitsla í Norðurlondum, og tað er ta náttina, at trøllkonur ríða at Bloksbjørgum. Germanskt navn, ið merkir vald og vernd.

1. mai er arbeiðaradagurin, sum varð hildin á fyrsta sinni í París í 1889.

## Minningarorð um Dánjal Jákup Arnason Nielsen

Ikki vardi tað meg, at eg hendan lagnutunga dagin skuldi fáa tey tungu sorgarboð, at tú var farin, bert 6 ára gamal. Nú ein tíð er fráliðin, koma minnini fram, og eru tey mong og bara góð. Vaksin upp í Fámjin sum einasti bróður av trimum systkjum, komst tú ofta til Froðbiar at vitja ommuna og abban. Og ikki var tú seinur eisini at koma at vitja langommuna. Enn hoyrist tín rødd og tín smittandi látur, tá tú læst dyrnar upp. Ofta bleiv tað so, at tú ikki vildi avstað aftur, men svav hjá langommuni.

Vaksin upp á bygd, dámdi tær so sera væl kríatúrini og alt tað, sum hartil hoyrdi og nýtti tú nógvar løtur saman við teimum. Eitt annað, sum tær dámdi serliga væl, var at fara oman í Víkagerð við tráðuni. Men eitt setti tú sum treyt, og tað var, at omman var við. Har niðri høvdu vit nógvar ógloymandi løtur saman.

Við tínum verumáta og altíð glaða



lyndi, savnaði tú tær nógvar vinir, og vóru øll góð við teg, ikki minst bygdafólk títt í Fámjin. Hetta sást eisini aftur á tí ovurstóra skara sum fylgdi tær til títt síðsta hvíldarstað her á fold.

Hví hendan vanlukkan skuldi henda, duga vit ikki at skilja, men mugu bert siga sum sálmaskaldið:

*Saknið tungan harmin vekur,*
*at so brátt vit mistu teg,*
*Harin gevur,*
*Harrin tekur,*
*ei vit skilja Harrans veg.*
*Best sum sólin fagrast skínur,*
*deyðin inn um dyrnar trínur«.*

Hvíl í friði, kæri skattur.

**Langomman í Froðba**

Havnar Arbeiðsmannafelag:

## Ruth Arge 25 ára starvsdag



Í morgin 1. mai hevur Ruth Arge verið í starvi sum skrivstovukvinna hjá Havnar Arbeiðsmannafelag í 25 ár.

Felagið ynskir henni hjartaliga tillukku við degnum.

## 30 ára starvsdagur

Týsdagin 1. mai hevur Jonhild Bech í Porkeri starvast á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi í 30 ár.

Jonhild Bech er fødd 10. august 1942, dóttir Annu og Svend Borg. Hon er gift við Zacharias Bech. Børnini eru fýra í tali, og ommubørnini eru somuleiðis fýra í tali.

Jonhild lærdi á Dronning Alexandrines Hospital og bleiv útlærd í 1965. Hevur arbeitt á Landssjúkrahúsinum, Suðuroyar Sjúkrahúsi, hjá kommunulæknanum í Vági, so aftur á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Síðan 1. mai 1977 hevur hon arbeitt fast á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi.

Hon hevur ongantíð øll hesi árini verði burtur frá arbeiðinum. Hevur einans verið burtur í ein dag hesi 30 árini. Tað var í mars 1998, at tað legðist nógvur kavi og Hovsegg bleiv stongd fyri ferðslu orsakað av væntandi skalvalopi. Tá slapp hon so ongan veg tann dagin.

Vit vilja ynskja henni hjartaliga tillukku á starvsdegnum og nøkur góð ár enn á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi.

**Ynskja børnini**



Lesið Sosialin

www.sosialurin.fo

## Sólstrálur á Skálatrøð

Hesi fittu barnagarðsbørnini sótu so fitt á eini trappu niðri við bátabrúgvarnar á Skálatrøð og hugnaðu sær í góðveðrinum.

Børnini koma frá barnagarðinum Sólareyga, og stovan hjá hesum børnunum eitur Ljósið.

Pedagogarnir og hjálpararnir Joan, Durita, Leila og Dagny siga, at tær gleðast fyri hvørja sólstrálu tær kunnu fáa saman við børnunum, tí børnini elska slíkar túrar, eisini úti í náttúruni.

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

